## 120 tíðindafólk latið lív

Tað hevur ongantíð verið vandamiklari at arbeiða sum tíðindamaður. Altjóða journalistfelagið, IFJ, er farið undir at gera hagtøl yvir dripin tíðindafólk, og higartil í ár hava í alt 120 tíðindafólk latið lív. Í desember mánaði eru tvey tíðindafólk dripin.

– Drápini í desember mánaði er tey seinastu vitleysu drápini í einum ræðuligum ári.. Hetta er tað ringasta árið nakrantíð, sigur Aidan White, aðalskrivari í IFJ, við Politiken

Tað seinasta drápi varð framt í gambiska høvuðsstaðnum, Banjul, tá AFP-tíðindamaðurin, Deida Hydara, varð skotin.

– Flestu av hesum drápum kundu vit ikki sloppi undan, men tilætlaðu drápini, vit hava sæð í Filippinunum, Irak og nú Gambia skulu kannast í odd og egg, so drápsmenninir koma fyri ein dómstól, sigur Aidan White við Politiken

.páll

## Porno úr Nuuk

Seinasta týsdag kom undan kavi í grønlendsku fjølmiðlunum, at seinasta hond verður í løtuni løgd á fyrsta grønlendska pornofilmin nakrantíð. Sambært Grønlandspostinum varð pornofilmurin upptikin 10. desember á eini ókendari adressu í grønlendska høvuðsstaðnum, Nuuk.

Seinastu vikurnar hava fleiri uppsløg verið á busssteðgiplássum í Nuuk við yvirskriftini: "Tørv á eyka lummapengi", har tað við lítlum stavum hevur verið skrivað, at umsøkjarnar helst skulu vera kvinnur millum 16 og 25 ár, sum hava árræði at vera við einum frekkum filmi.

Filmurin verður framleiddur í Týsklandi og Hollandi, og tað er framvegis ógreitt, hvat heitið á filminum verður.

.páll

# Týskarar fagna føroyska makrelinum

**Týska tónleikatíðaritið, Obliveon, hálovar útgávuni, Wonderland, hjá føroyska rockbólkinum Makrel. Í seinastu útgávuni fær føroyski bólkurin níggju av tíggju stjørnum frá týska tónleikatíðaritinum**



*Føroyski rokkbólkurin, Makrel, fær 9 út av 10 møguligum stjørnum frá týska tónleikaríðarritinum Obliveon*

*Savnsmynd*

TÝSKT UMMÆLI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Føroyski tónleikabólkurin, Makrel, hevur verið millum virknastu bólkarnir á føroyska tónleikapallinum í ár. Umframt at hava spælt á einum hópin av tiltøkum, lat bólkurin fyrr í ár sína seinnu fløgu úr hondum. Makrel gjørdi veruliga vart við seg á Prix Føroyum í 2003, tá bólkurin endaði á einum triðja plássi. Síðan 2003 hevur bólkurin givið tvær fløgur út. Tann fyrra, Makrel Stinkar, kom út á vári 2003, meðan tann seinna, Wonderland, kom út í ár.

Bólkurin hevur ikki einans verið virkin í Føroyum í ár. Í august spældi Makrel á einum tiltaki í Vega í Danmark og fyri sløkum tveimum mánaðum síðan luttók bólkurin í kappingini, Global Battle of the Bands, sum varð hildin í lítla Vega.

### Frálíkt skoðsmál

Eftir øllum at døma eru tað ikki bert danir og føroyingar, sum hava fingið eyguni upp fyri føroyska rokkbólkinum. Í seinastu útgávuni hjá týska tónleikatíðaritinum, Obliveon, er eitt ummæli av útgávuni Wonderland hjá Makrel. Oblivon er eitt tónleikatíðarrit, sum hevur heavy metal og gotiskan tónleik sum serøki.

Tað eru ikki hissini skoðsmál, týska tíðarritið gevur Makrel. Av møguligum tíggju stjørnum fær útgávan hjá Makrel tær níggju. Sosialurin hevur valt at umseta ein part av ummælinum hjá týska tónleikatíðarritinum, Obliveon:

*Hóast Føroyar, eins og Grønland, hoyra undir Danmark, eru oyggjarnar sjálvstøðugar. Og sjálvstøðugan mást tú flokka tónleikin hjá teimum fimm úr Makrel. Tað er ómetaliga torført at greiða frá ljóðinum hjá Makrel. Ov sjálvstøðugir, ov egnir eru míni fyrstu skoðsmál.*

*Wonderland, sum er seinna fløgan hjá bólkinum, livir av mótsetningum. Á einari síðu er tað melodiskur, næstan slóðbrótandi popputtur rokkur, sum hinvegin verður avbrotin av kenslubornum útbrotum frá tí melankolska og súrsøta sanginum hjá frontmanninum, Ára Rouch.*

*Yvir øllum sveimar droymandi gittarljóðið hjá Rasmus Rasmussen. Av og á, tá eg hoyri fløguna, hugsi eg um ljóðið hjá The Police, tá teir spældu metal tónleik. Og tó er ljóðið tungt og myrkt, sum minnir um gomlu gittarljóðini frá Death Metal tíðini. Eg vil kortini ikki lýsa Makrel sum metal bólk. Teir eru melankoliskir, harðir, kensluborнir og og snøgt sagt ótrúliga góðir.*

*Eg vil biða allar elskarar av skilagóðum rocktónleiki, sum lurta eftir øllum frá The Police og U2 til Paradise Lost og Tool, at ogna sær fløguna. Fløgan fær 9 av 10 stjørnum.*

# Hergeir kann fella

**Um tingmanning Tjóðveldisfloksins velir at útihýsa Tórbjørn Jacobsen, kann avleiðingin verða, at Hergeir Nielsen ikki sleppur at halda sum 1.næstformaður í Løgtinginum**

NÆSTFORMAÐURIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Innanhýsis stríðið í Tjóðveldisflokkinum kann fáa avleiðingar fyri løgtingsins formansskap. Eftir løgtingsvalið 20 januar fyrr í ár varð fyrrverandi løgmaður, Edmund Joensen, tilnevndur sum løgtingsformaður, meðan Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannnesen og Óli Breckmann vóru valdir til næst formenn í løgtinginum.

Størsti flokkur á løgtingið eigur altíð rættin til 1.næst formann, og í løtuni er Tjóðveldisflokkurin størsti flokkur. Hetta kann kortini brádliga broytast um Tórbjørn Jacobsen verður settur uttanfyri tingmanningina hjá Tjóðveldisflokkinum. Verður úrslitið av innanhýsis floksstríðnum millum Høgna Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, at eysturoyartingmaðurin verður útihýstur verður Tjóðveldisflokkurin ikki longur einsamallur størsti flokkur á tingi.

Kemur Tjóðveldisflokkurin við umbøn um at útihýsa Tobba telir tingmanning Tjóðveldisfloksins brádliga einans sjey tinglimir, og tá verður flokkurin líka stórur sum Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin. Av tí, at flokkarnir gerast eins stórir missir Tjóðveldisflokkurin framíhjárættin til 1. næstformann og Løgtingið verður noytt at greiða atkvøðu um, hvør skal verða fyrsti næstformaður í løgtingsins formanskapi. Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannesen og Óli Breckmann eru í løtuni ávikavist 1., 2. og 3. næsturformaður í løgtinginum.

> ”
> **Tingskipanin**
> *§ 10. Flokkarnir, sum umboðaðir eru á løgtingi, uttan flokkurin, løgtingsformaðurin er úr, tilnevna eftir stødd tingmann til 1., 2. og 3. næstformann. Stendur á jøvnum, ræður lutakast*

# Sendimenn flyta um

**Komandi heyst flytir sendimaður Føroya í London, John Rajani, heimaftur. Sendimaðurin í Evropa Samveldinum, Hákun J. Djurhuus, loysir hann av London, meðan Sigmundur Isfeldt verður nýggjur sendimaður í Brússel**

FØROYSKAR SENDISTOVUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Komandi heyst fer verulig umflyting fram á føroysku sendistovunum í London og Brússel.

Seinastu árini hevur fyrrverandi stjórin á Løgmansskrivstovuni, John Rajani, umboða føroysk áhugamál í London, men í september mánað flytir hann heimaftur. Ætlanin er, at John Rajani aftur skal í starv á Løgmansskrivstovuni.

Avloysarin á sendistovuni í London verður sendimaðurin Føroya í Evropa Samveldinum seinastu árini, Hákun J. Djurhuus. Hann skal eftir ætlan loysa John Rajani av komandi heyst. Nýggjur sendimaður í Brússel verður Sigmundur Isfeldt, sum seinnu árini hevur starvast á Løgmansskrivstovuni í Tinganesi

### Tríggjar sendistovur

Í løtuni hevur Føroya Landsstýri tríggjar sjálvstøðugar sendistovur. Umframt sendistovur í London og Brússel, hava Føroyar eisini eina sendistovu í Keypmannahavn. Sendimaður í Keypmannahavn er Tryggvi Johansen.



*Eftir ætlan flytir sendimaðurin í London, John Rajani, heim til Føroya í september. Hann fer aftur í starv á løgmansskrivstovuni*